# Persona Non Grata, spillfekst yrkingarsavn



Annika Bech

Tónleikarin og yrkjarin Petur Jensen er komin út við einum nýggjum yrkingasavnið sum inniheldur 21 heldur daprar men sera áhugaverdar yrkingar.

Persona non grata, ella Dottin í ónáðir, kallast tað, og er tað tað fjórða yrkingasavnið, sum Petur gevur út.

Við nøvnum sum Matahari, Intermezzo, Barbie Messias, Latex, Fødd nakin o.s.v, leiður Petur okkum, sera livandi, inn í hansara hugaheim. Hann fortelur við einari ærligheit, sum ein einans kann vera hugtikin av, hvat hann heldur um heimin, menniskjur og ikki minst seg sjálvan.

Petur er bert 28 ára gamal, og ein má siga, at tað ikki er so lítið, sum hann hevur megnað at útint ígjøgnum sítt "stutta" lív. Síðani hann var 20 ár, hevur hann givið frá sær 4 yrkingasøvn, verið oddamaður í nøkrum væl dámdum tónleikabólkum so sum Visible Fish, og sum óivað øll vita Clickhaze, ið fyri gott tveimum vikum síðani, gjørdist tann bólkurin, ið fór avstað við Prix Føroyar heitinum, sum tey við vissu høvdu uppiborið.

Savnið er gott skrivað og um ein dámar at fordjúpa seg í yrkingum, so vil hetta yrkingasavnið vera sera áhugavert at lesa.

Tað er forlagið Sprotin ið gevur yrkingasavnið út. Tað kostar 130 kr og fæst í øllum bókasølum kring landið.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og regn. Hitin millum 6 og 9 stig. Seinnapartin hækkar hann upp í vestan ella útnyrðing og minni vindur.Ælingur, men eisini sólglottar. Eitt sindur kaldari.




**Veðrið hósdagin:**
Fleyr til gul av útnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 2 og 5 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og fyrrapartin turt, men seinni regn. Hitin millum 3 og 6 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi, sunnudagin minni vindur. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 6 og 10 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -6 |
| Nuuk | -5 |
| Qaqortoq | 0 |
| Ammassalik | 2 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 4 |
| Seyðisfjørður | 5 |
| Tórshavn | 5 |
| Lerwick | 8 |
| Aberdeen | 9 |
| London | 12 |
| Tromsø | 7 |
| Bergen | 9 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | – |
| Keypmannah. | 14 |
| Helsinki | 14 |
| Moskva | 19 |
| Berlin | 22 |
| Warzawa | 24 |
| Kiev | 20 |
| Bukarest | 20 |
| Paris | 11 |
| Madrid | 9 |
| Róm | 21 |
| Malorca | 20 |
| Athen | 23 |
| Malta | 19 |
| Tunis | 25 |
| Beijing | 22 |
| New Dehli | 38 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 18 |
| New York | 22 |
| Miami | 23 |
| Los Angeles | 15 |
| Meksikobýur | 20 |
| Panama | 33 |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 13 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 989 hPa. yvir Grønlandsfjørðinum fer eystureftir og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum mikumorgunin.




Lágtrýstið í landnyrðing úr Íslandi hvørvur í landnyrðing og ein minni hátrýstryggur yviri á Vesturlandinum kemur móti Føroyum.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 30/04 kl. $06^{00}$–01/05 kl. $06^{00}$. Hitin í gjár: 5,3°
Minsti hiti máldur í apríl: ÷9,9° Mesti hiti máldur í apríl: 15,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 1,2 mm – mált frá 30/04 kl. $06^{00}$–01/05 kl. $06^{00}$
Avfallið higartil í apríl: 80,5 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

30. apríl: Fyrra kvarter
2. mai: Mánin næstur jørðini
7. mai: Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmanna-sundi fp. | Vestmanna-sundi sp. | Mykines-firði fp. | Mykines-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2. mai | 03.13 | 15.36 | 02.13 | 14.36 | 02.28 | 14.51 | 05.13 | 17.36 | 06.13 | 18.36 |
| 3. mai | 04.00 | 16.25 | 03.00 | 15.25 | 03.15 | 15.40 | 06.00 | 18.25 | 07.00 | 19.25 |
| 4. mai | 04.50 | 17.14 | 03.50 | 16.14 | 04.05 | 16.29 | 06.50 | 19.14 | 07.50 | 20.14 |
| 5. mai | 05.38 | 18.01 | 04.38 | 17.01 | 04.53 | 17.16 | 07.38 | 20.01 | 08.38 | 21.01 |

| Dagur | Nólsoyar-firði fp. | Nólsoyar-firði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvanna-sundi fp. | Hvanna-sundi sp. | Fugloyar-firði fp. | Fugloyar-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2. mai | 01.28 | 13.51 | 00.28 | 12.51 | 03.28 | 15.51 | 04.28 | 16.51 | 02.58 | 15.21 | 04.13 | 16.36 |
| 3. mai | 02.15 | 14.40 | 01.15 | 13.40 | 04.15 | 16.40 | 05.15 | 17.40 | 03.45 | 16.10 | 05.00 | 17.25 |
| 4. mai | 03.05 | 15.29 | 02.05 | 14.29 | 05.05 | 17.29 | 06.05 | 18.29 | 04.35 | 16.59 | 05.50 | 18.14 |
| 5. mai | 03.53 | 16.16 | 02.53 | 15.16 | 05.53 | 18.16 | 06.53 | 19.16 | 05.23 | 17.46 | 06.38 | 19.01 |

Vilja tygum við í Býin - hvønn hósdag

